

v/ Rigmor Dam

## BRÚKARATEIGUR

# Hálvskúmað mjólk til smábørnini

**Vandin fyri hjarta- og æðrasjúkum ger, at børnini ikki skulu drekka feita mjólk**



*– Heilsusystraskipanin í Føroyum vanliga fylgir tilmælum, sum koma frá almennum donskum heilsustovnum; sigur Bjørghild Djurhuus, heilsusystur í Havn*

Seinastu mongu árini hava heilsumyndugleikarnir sagt, at børn undir trý ár skulu drekka feita mjólk (søtmjólk). Nú siga somu myndugleikar, at eitt til trý ára gomlu børnini skulu drekka hálvskúmaða mjólk. Hetta stendur í frágreiðingini »Børn, fedt og hjertekar-sygdomme«, sum danska Føðsluráðið (Ernæringsrådet) hevur gjørt.

Sambært formanninum í Føðsluráðnum, Arne Astrup, minkar vandin fyri at fáa hjarta- og æðrasjúkur seinni í lívinum, um børn drekka minni feita mjólk. Hann sigur, at longu í heilt ungum árum verður grundalagið fyri sjúkum lagt, og tá ið børnini eru komin í skúlaaldur, hevur helmingurin av teimum feittrípur í æðrunum.

Kortini nýtast foreldur ikki at óttast feitu mjólkina. Fyri tað fyrsta sigur frágreiðingin einki um, at feita mjólkin er beinleiðis heilsuskaðilig. Harumframt skulu smábørnini enn hava eins nógv feitt sum fyrr, munurin er bert, at nú skulu tey ikki hava ov nógv mettað feitt.

– Føðsluráðið metir ikki, at visundarligt grundarlag er fyri at broyta núverandi tilmælini fyri hvussu nógv feitt børn skulu hava. Kortini vísir ráðið á, at nøgdin av mettaðum feitti til smábørn eigur at vera ájavnt við nøgdina til vaksin, sigur Kim Fleischer Michaelsen, professari dr.med. Han er formaður í arbeiðsbólkinum, sum hevur gjørt frágreiðingina “Børn, fedt og hjerte-kar-sygdomme”.

Føðsluráðið hevur ikki funnið nakran samanhang millum hvussu nógv feitt børnini eta og um tey verða feit. Arne Astrup sigur tó, at talið av feitum tvey til trý ára gomlum er hækkað seinastu árini.

Eingin vandi er fyri at børninin verða ov rak, um bara tey fáa meira enn 25 energifeittprosent (E%). Vandi kemur í um børn fáa kost við skúmaðmjólk og mosi ella greyt við ongum feitti í. Tí verður enn tilmælt, at koyra eina teskeið av olju ella margarini í matin hjá børnum yngri enn eitt ár.

Frá barnið er eitt ár, eigur tað at eta sama mat sum familjan, og annars at drekka ein hálvan litur av hálvskúmaðari mjólk dagliga.

## Eisini hálvskúmað mjólk til føroysk smábørn

Heilsusystur Bjørghild Djurhuus úr Havn sigur, at heilsusystraskipanin í Føroyum vanliga fylgir tilmælum, sum koma frá almennum donskum heilsustovnum.

Oftast ganga nakrir mánaðir áðrenn vit seta tilmælini í verk her hjá okkum, men vit fara heilt vist eisini at tilmæla hálvskúmaða mjólk til børn millum eitt og trý ár, meðan børn yngri enn eitt ár framhaldandi skulu hava søtmjólk, sigur hon við brúkarateigin.

## Lívshættisligt arbeiði hjá Nike og Adidas

Arbeiðsfólk verða sjúk av eitrandi royki, fáa arbeiðsskaðar og ov lítla løn á verksmiðjunum hjá skógvafyritøkunum Nike og Adidas í Indonesia. Hetta verður avdúkað í frágreiðingini, We Are Not Machines, sum altjóða hjálparfelagsskapurin, Oxfam, hevur almannakunngjørt í sambandi við at felagsskapurin fyri aðru ferð innan tvey ár hevur kannað arbeiðsviðurskiftini á verksmiðjunum. Hesaferð var endamálið við kanningini at kanna um viðurskiftini vóru batnaði síðan seinast. Men framstigini eru ring at hóma, hóast Nike sigur seg vera á røttu kós við at bøta um arbeiðsumstøður hjá arbeiðarunum. Haraftur-ímóti góðtekur Adidas ikki niðurstøðurnar hjá frágreiðingini, men sigur at lønirnar júst eru hækkaðar og at fyritøkan eggjar fakfeløgunum at vera meira sjónlig á verksmiðjunum.

## Fyrireikið stóru íløgurnar

**Kannað marknaðin, áðrenn tú keypir**

Um tú skalt gera eina størri íløgu, so sum í barnaútgerð ella hvítvørur, ber til at leita í dátugrunninum hjá Forbrugerinformation, og vita um onkur kanning er gjørd av vøruni, sum tú ætlar at keypa. Soleiðis kanst tú læra at seta røttu spurningarnar til seljaran, og fáa eina hóming av marknaðinum sum heild. Mangan fylgjast prísur, góðska og umhvørvisfyrilit ikki, og tá er gott at síggja, hvørjar samanberingar eru gjørdar frammanundan. Ætlandi skulu allir vørubólkar verða umboðaðir í dátugrunninum, sum er at finna á www.fi.dk

# Nýrafelagið í Føroyum 10 ár

*Tíðindaskriv*

Nýrafelagið varð formliga sett á stovn tann 11. apríl 1992, og fyllir sostatt 10 ár í næsta mánaða. Felagið er ein deild av Dansk Nyreforening. Hetta ger, at limirnir fáa tilfar sendandi, sum danska felagið gevur út. Harumframt fáa umboð fyri Nýrafelagið høvi til at luttaka á fundum hjá danska felagnum. Eisini fáa nýrasjúk tilboð um frítíðarmøguleikar bæði í Danmark og aðrastaðni, har møguleiki er at fáa dialysuviðgerð.

Fyrsta takið hjá felagnum var at fáa dialysumaskinur til Føroya, soleiðis at teir sjúklingar, sum høvdu fyri neyðini at fáa hæmodialysuviðgerð, kundu búgva í Føroyum. Í dag eru 4 dialysumaskinur í brúki í Føroyum, t.v.s. at við núverandi manning kunnu í mesta lagi 8 sjúklingar vera í hesari viðgerð. 7 tílíkir sjúklingar eru í Føroyum í løtuni. Um fleiri enn ein sjúklingur kemur afturat, sum hevur tørv á hæmodialysuviðgerð, verður neyðugt at útbúgva fleiri dialysusjúkrasystrar. Tað er komið fyri, at talið av dialysusjúklingum hevur verið størri enn orkan á Landssjúkrahúsinum hevur klárað. Hetta hevur ført við sær, at føroyingar, sum eru noyddir at fara til Danmarkar at byrja slíka viðgerð, ikki hava kunna fingið boð um nær teir kunnu, ella um teir í heila tikið kunnu sleppa heim aftur og fáa dialysuviðgerð í Føroyum. Tað tekur umleið somu tíð at umskúla eina dialysusjúkrasystur sum tað tekur at gera ein nýrasjúkling kláran til at kunna fáa dialysuviðgerð. Í nýggja bygninginum hjá Landssjúkrahúsinum, er ein dialysustova, har pláss verður fyri 4 maskinum. Inntil í fjør vóru 3 maskinur í brúki. Harumframt eru 4 sjúklingar, sum fáa posadialysu Tað eru fleiri føroyingar, sum seinastu árini hava fingið nýratransplantatión.

Eingin nýralækni er í Føroyum í dag. Tað eru yvirlæknar á medisinsku deildini á Landssjúkrahúsinum, ið taka sær av nýrasjúklingum. Avtala er millum Landssjúkrahúsið og Ríkissjúkrahúsið um konsulenttænastu, t.v.s. at ein serlækni í nýrasjúkum kemur til Føroya 4 ferðir um árið at kanna sjúklingarnar.

Nýrafelagið hevði aðalfund tann 9. februar, har nevndin bleiv vald. Odny Thomsen varð afturvald til formann, Karin Elisa Niclasen til kassameistara og Tummas Pauli Thomsen til skrivara. Hinir nevndarlimirnir eru Bergfinn Joensen og Hallbjørg Hansen, sum er nývald. Katrin Selfoss, sum var skrivari bar seg undan afturvali. Eykalimir eru Heini Joensen og Elias Bergsson, sum er nývaldur.

Tann 21. mars byrjar árliga lutaseðlasølan hjá felagnum. Føroyska felagið fær 40% av inntøkuni fyri seldu seðlarnar í Føroyum. Hetta er ein týðandi inntøkukelda hjá felagnum, og vóna vit tí at føroyingar aftur í ár fara at taka væl undir við hesum.

Lóg um heiladeyðskriteriið varð lýst í Føroyum í fjør, men enn hevur Almanna og Heilsumálastýrið einki gjørt við upplýsingarherferð ella líknandi, eins og gjørt hevur verið í øðrum londum. Lógin hevur við sær at føroyingar nú av álvara kunnu vera við til at bjóða seg fram til at vera organdonorar. Nýrafelagið hevur av sínum eintingum skaffa nakrar danskar faldarar við organtestamenti, sum eru lagdir út á apotekini, men vónar at fáa hjálp frá Almanna- og Heilsumálastýrinum til at fáa hendan ella eina føroyska útgávu senda í hvørt hús í landinum, so øll kunnu kunna seg um innihaldið og taka støðu til organtransplantatión.

Nýrafelagið ætlar seinni í ár at skipa fyri kunnandi fundi um heiladeyðskriteriið. Nær hesin verður, er ikki heilt avgjørt enn. Felagið heldur, at tað hevur týdning at kunna fólk um hetta, nú tað eru fleiri og fleiri føroyingar, ið hava fingið transplantatión, meðan tað eru onnur, sum bíða.

Tað kostar 150 kr. um árið at vera limur í Nýrafelagnum, og harvið eisini at fáa blaðið Nyrenyt sendandi, sum kemur seks ferðir um árið. Áhugað kunnu tekna seg sum lim við at ringja til formannin í felagnum, tlf. 315928, E-mail: thomsen1@post.olivant.fo, ella onkran av nevndarlimunum.



## UTTAN ÚR HEIMI

# Aftur ein sjálvmorðsbumba í Ísrael



*Daglig sjón í Ísrael. Her eru tað ein pápi og ein bróður, sum syrgja ein falnan ísraelskan hermann*

*Mynd: Reuters*

**Amerikanski varaforsetin, Dick Cheney, var ikki meiri enn farin úr Ísrael, tá ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður drap fimm ísraelsmenn**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Minst seks fólk doyðu, og umleið 30 vórðu særd, tá ein palestinskur sjálvmorðsbumbumaður sprongdi seg í luftina inni í einum bussi norðan fyri Tel Aviv gjáramorgunin.

Fólk, sum sóu tilburðin, greiddu ísraelska útvarpinum frá, at spreingingin var ógvuliga hørð. Tey søgdu, at maðurin var mitt í bussinum, tá hann lat bumbuna ganga av. Bussurin var á veg úr Tel Aviv til býin Afula, sum er longur norðuri, og tey flestu fólkini í bussinum vóru ísraelsmenn, sum vóru á veg til arbeiðis.

Tilburðurin, sum var beint við ta sokallaðu "grønu linjuna", sum skilir Ísrael og Vestara Áarbakka, hendi dagin eftir, at amerikanski varaforsetin, Dick Cheney, var farin úr Ísrael, har hann hevði tosað við politisku leiðararnar um møguleikarnar fyri friði.

Tilburðurin var tó ikki tann fyrsti aftan á amerikansku vitjanina, tí longu týskvøldið skutu ísraelskir hermenn tveir palestinar, sum høvdu søkt at einari ísraelskari bygd á Vestara Áarbakka.

Ísraelska stjórnin endurtók í gjár, at palestinski leiðarin, Yasser Arafat, ger ikki nóg mikið fyri at forða álopum á ísraelsmenn.

# Mistak var helst orsøk til vanlukku

**Ein fyribilskanning hjá týsku hernaðarmyndugleikunum vísir, at ein av týsku hermonnunum gjørdi eitt mistak, tá hann saman við øðrum týskum og donskum hermonnum skuldi oyðileggja eina gamla russiska rakett í Afghanistan. Vanlukkan kostaði fimm hermonnum lívið**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Spreingivanlukkan í afghanska høvuðsstaðnum Kabul tann 6. mars, sum kostaði trimum donskum og tveimum týskum hermonnum lívið, stóðst av einum mistaki hjá einum av teimum týsku hermonnunum. Tað upplýsti statsadvokaturin í týska býnum Potsdam í gjár.

Vanlukkan hendi, tá danskir og týskir hermenn vóru í ferð við at oyðileggja nakrar gamlar russiskar rakettir av slagnum SA-3, og ein kanningarnevnd við donskum og týskum umboðum hevur júst verið á vanlukkustaðnum og kannað umstøðurnar.

Donsku hernaðarmyndugleikarnir vilja ikki gera nakrar beinleiðis viðmerkingar til tað, sum statsadvokaturin í Potsdam hevur sagt, men ein talsmaður hjá donsku herleiðsluni segði í gjár, at statsadvokaturin hevði fingið upplýsingar frá teimum týsku umboðunum í kanningarnevndini.

Átta danskir hermenn fingu skaða av spreingingini, og serfrøðingar á økinum hava síðani undrast á, hví so nógvir hermenn vóru hjá rakettini, sum skuldi oyðileggjast. Ein týsk sjónvarpsstøð vildi í síðstu viku vera við, at teir týsku hermenninir høvdu boðið sær til at vísa sínum donsku feløgum, hvussu tær gomlu russisku rakettirnar vóru settar saman, og hvussu tær kundu takast sundur. Týskararnir hildu seg hava betri kunnleika, tí teir høvdu sæð tær russisku rakettirnar í gamla Eysturtýsklandi.

Danska herleiðslan segði týsdagin, at hon fer at bíða við teirri endaligu frágreiðingini, til dansk-týska kanningarnevndin er liðug við arbeiði sítt.

Búskapur og vinna:

## Ikki longur niður

Amerikanski tjóðbankin hevur boðað frá, at talan verður ikki um fleiri rentulækkingar, tí tað verður ikki hildið neyðugt, soleiðis sum gongdin í amerikanska búskapinum hevur lagað seg. Í fjør lækkaði amerikanska rentan heilar ellivu ferðir.

Sambært tjóðbankanum vóru amerikansku prísirnir 1,1 prosent hægri í januar í ár enn í januar í fjør, og hóast munurin er lítil, halda serfrøðingar hetta vera eina ábending um, at tjóðbankin helst fer at hækka rentuna eitt vet í næstum. Sum er er amerikanska rentan 1,75 prosent, men serfrøðingar siga tað ikki vera óhugsandi, at hon kanska verður um trý prosent við árslok. Málið við hækkingini verður at forða fyri, at ov nógv ferð kemur á búskapin. Hinvegin er hugsandi, at bankin fer at bíða við at steðga gongdini, tí enn er óvist, hvussu kríggið ímóti altjóða yvirgangi fer at ávirka brúkararnar og ikki minst íleggjararnar.

Svenski ríkisbankin hækkaði týsdagin rentuna 0,25 prosentstig, so hon nú er 4,0 prosent. Hækkingin kom ikki óvæntað, tí herfyri ávaraði ríkisbankin ímóti veksandi inflasjón.

Svenska rentan hevur verið óbroytt síðani 17. september í fjør. Tá lækkaði amerikanski tjóðbankin sína rentu aftan á yvirgangsatsóknirnar eina viku frammanundan, og tá gjørdi svenski ríkisbankin tað sama og setti rentuna 0,5 prosentstig niður.

## Eitt tað størsta

Almenna norska felagið Cermaq verður nú lagt saman við stóru alifyritøkuni Fjord Seafood.

Nýggja felagið verður eitt tað størsta í heiminum innan alivinnuna og fer at hava ein umsetning upp á smáar 10 mia. krónur.

Úr Norðurlondum:

## SV fram um Ap

Ein nýggj veljarakanning í Noregi vísir, at Sosialistiski Vinstraflokkurin nú er størri enn Arbeiðaraflokkurin og sostatt størsti flokkur á vinstravonginum í norskum politikki. Kanningin gevur SV 18,8 prosent av atkvøðunum ella 4,2 prosentstig meiri enn tann seinasta kanningin. Arbeiðaraflokkurin hevur hinvegin 2,3 prosentstig í afturgongd og fær nú 17,3 prosent av atkvøðunum.

Næstformaðurin í SV, Øystein Djupedal, sigur, at hóast talan er um eina kanning og ikki eitt val, væntar hann, at SV eisini hevur ein møguleika at fáa eitt betri valúrslit enn Arbeiðaraflokkurin næstu ferð.

Hjá teimum trimum stjórnarflokkunum gongur tað sambært kanningini eftir hæli. Størsti flokkurin í samgonguni, Høgri, fær 3,1 prosentstig í afturgongd og fær nú 20,3 prosent av atkvøðunum. Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra fær 9,6 prosent, sum er tvey prosentstig minni enn í seinastu kanning.

Framburðsflokkurin er størsti politiski flokkurin í Noregi. Kanningin gevur flokkinum 2,8 prosentstig í framgongd, soleiðis at í dag eru 24,5 prosent av norsku veljarunum til reiðar at atkvøða fyri Framburðsflokkinum. Við hesum úrslitinum hevði flokkurin fingið 42 stórtingslimir ímóti teimum 25, sum hann nú hevur.

## Stór kanning

Í einum felags evropeiskum løgreglutiltaki vórðu 1500 danskir lastbilar steðgaðir og kannaðir nú um dagarnar. Í 70 førum vísti tað seg, at førararnir høvdu ikki hildið reglurnar um hvíld, og í 50 førum var meiri í lastini, enn bilarnir høvdu loyvi at hava. Trettan førarar koyrdu ov skjótt.